## Hagstova Føroya

### Á Hagstovuni er eitt starv sum fulltrúi leyst at søkja

**Starvsinnihaldið**
Í høvuðsheitum er uppgávan at arbeiða við vinnuligum og øðrum búskaparligum hagtølum, sum liggja til grund undir ymsum uppgerðum.

Eitt nú til uppgerð av tjóðarroknskapi gera vit sonevndar deildarroknskapir fyri allar privatar vinnur, kommunurnar sum heild, landskassan og donsku statspartarnar í Føroyum. Starvið verður serliga at vera við í arbeiðinum við hesum deildarroknskapum, men kann saktans umfata aðrar hagtalsuppgerðir í sambandi við búskapin annars.

**Persónurin og útbúgvingin**
Brúk er tí fyri einum fólki við góðum innliti í roknskaparviðurskifti og skili fyri samfelagsbúskapi, sum dugir at arbeiða við mest vanligu telduforritum og sum ikki óttast at fara í holt við forriting. Tað er ein fyrimunur at kenna eitt sindur til forriting í SQL ella øðrum forritingarmáli, men ikki eitt krav kortini.

Hóast tað krevst at tú sjálvstøðugt ert førur fyri at loysa uppgávurnar tú fert at sita við, fert tú at hava tætt samstarv við aðrar búskaparfrøðingar, teldufyrisiting og skrivstovufólk á stovninum.

Til starvið krevst útbúgving sum cand.polit., cand.oecon., cand.merc. ella bachelor útbúgving í búskaparligum/fíggjarligum lærugreinum.

**Arbeiðsplássið**
Hagstovan er fyrst og fremst eitt víttfevnandi stað, har ið tú fært innlit í avgerandi og aktuell samfelagslig viðurskifti, tí umframt at lýsa samfelagið í regluligum uppgerðum, eru vit eisini við í lýsingini av øðrum aktuellum viðurskiftum, sum stinga seg upp. Alt sum vit framleiða av vitan og upplýsing er til at kunna borgararnar um, so at ein partur av flestu uppgávum er at hava samskifti við onnur.

**Løn og treytir annars**
Starvið verður lønt eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi fakfelag, og setanarøkið er fyrst og fremst Hagstovan, men eisini Fíggjarmálastýrið í síni heild.

**Umsóknarfreist og annað**
Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 15. mars 2000, og starvið skal verða sett so at byrjast kann í seinasta lagi 1. apríl 2000.

Nærri fæst at vita um starvið frá Hagstovuni tlf. 352028.

## Handil í Havn

søkir aðrar handlar at geva út eitt regluligt lýsingablað saman við.

**Bill.mrk. 590781**

## Útbjóðing

Vegna Almanna- & Heilsumálastýrið verða arbeiðini í sambandi við bygging av Landsstovni í Klaksvík fyri autistar og onnur, boðin út í almenna lisitatión.

Bygningurin, sum er 514 m² stórur, hevur tveir høvuðsbygningar, sum eru samanbundnir við einum millumbygningi. Kjallari er undir millumbygningi og øðrum høvuðsbygningi.

Arbeiðstøkurnar eru:

**Sum høvuðsarbeiðstøka:**
Jørð-, kloakk-, betong-, timbur- og snikkaraarbeiði.

**Sum fakarbeiðstøkur:**
Múrara-, málara-, gólvápleggingar-, HVS- og el-arbeiði.

Útbjóðingartilfarið fæst við at gjalda kr. 2.000,- fyri hvørja arbeiðstøku, á konto nr. 1598920 í Føroya Banka.

Síðsti dagur at biðja um útbjóðingartilfar er fríggjadagin 10.3.2000. Útbjóðingartilfarið verður sent arbeiðstakarunum í viku 10-11/00.

Tilboðini skulu sendast ella latast:
Bygginevndini fyri Landsstovn fyri autistar og onnur, N. Pálsg. 32, 700 Klaksvík, í afturlatnum brævbjálva, merktur:

**Landsstovnur fyri autistar og onnur**

Innkomin tilboð verða latin upp, mikudagin 29. mars 2000 kl. 11.00 á Býráðsskrivstovuni í Klaksvík og kunnu tilboðsgevarar vera hjástaddir.

**Sakaris Guldbro**
Byggifrøðingur • 520 Leirvík
Tlf. 443354

## El-lærlingur

Søkt verður eftir el-lærlingi at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

Í dag starvast 6 fólk í fyritøkuni, og vit gera allar vanligar el-innleggingar, stýringar, alarmskipanir, edv-installatiónir v.m.

Um hetta hevur tín áhuga, er tú vælkomin at senda eina skrivliga umsókn.

Nærri upplýsingar fáast á telefon 213313 ella 443313.

**EL-TEKNIK Sp/f**
Telefon 443313 ella 213313, fax 443314
E-mail: elteknik@post.olivant.fo
FO-520 Leirvík

## Eykaaðalfundur

Boðað verður til eykaaðalfundar á Parnassinum á Hotel Hafnia hósdagin 9. mars 2000, kl. 19.30.

Fundarskrá: Lógarbroytingar.

**Havnar Handverksmeistarafelag**

**Toll- og Skattstova Føroya, Streymoyar øki**

## Avloysarastarv á Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki

er leyst at søkja frá 1. apríl 2000 til 31. oktober 2000. Starvið umfatar umsiting av vinnuskránni og annað fyrifallandi skrivstovuarbeiði.

Umsøkjarar við HH-prógvi ella royndum innan skrivstovuarbeiði hava fyrimun.

Løn og setanarviðurskifti verða ásett eftir sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Starvsmannafelagið í lønarflokki 8.

Umsóknir saman við prógvum o.ø. verða at senda til Toll- og Skattstovu Føroya, Streymoyar øki, Postboks 3139, 110 Tórshavn í seinasta lagi tann 16. mars 2000.




**Brenniovnur av merkinum Alta til sølu**
Ovnurin er spildurnýggjur og er bert brúktur eina ferð til roynd
*Skorsteinssóparin*
*Hvalvík • Tel. 422456*

**FLOGFRAKT/ SJÓFRAKT**




GREIÐA ALLAN FLUTNING & ØLL PAPPÍR
**Tlf. 32 22 22**

**GÓÐIR BRÚKTIR BILAR TIL SØLU**

| Merki | Árg. |
|---|---|
| Ford Escort 1,8 Diesel | 94 |
| Fiat Cinquecento | 95 |

*Fígging kann útvegast*

**Bilfríðkan**
*Velbastaðvegur*
*110 Tórshavn*
*Tel. 317300 - 217300*




Viðmerking:

# Øll eru sjálvstýrishugað



Í Sosialinum tann 26. februar í ár skrivar Hanus Andreassen, rithøvundur um politisku flokkarnar, at nakrir eru sjálvstýrishugaðir og aðrir ikki. Hetta minnir ikki sørt um skrivingina hjá Høgna Hoydal, sum eisini roynir at luta sínar landsmenn sundur í tveir bólkar.

Hetta er ein argandi málburður, sum ikki er vanligur at síggja frá Hanusi.

Um vit livdu í 1930, ella har á leið, so kundi tú skilt slíkan málburð. Men nú vit skriva ár 2000, gevur tað lítla meining.

Hvønn føroying kennir Hanus Andreassen, sum ikki vil hava sjálvstýri og sjálvræði?

Við ella uttan gjaldskyldu Eru teir flokkar og politikarar, sum hava framt fleiri yvirtøkur uttan gjaldskyldu meira sjálvstýrishugaðir enn tey, sum heldur vildu yvirtaka við fullari gjaldskyldu?

Við loysingini ætlar samgongan at yvirtaka tað, sum eftir er at yvirtaka uttan gjaldskyldu. Kortini vil samgongan hava alt ræðið beinan vegin.

Vit skulu hava eina langa skiftistíð (Hanus nevnir 20 ella 25 ár), og tá hesi órímiligu krøv eru fráboðaði, skal samgongan byrja uppá sera truplar samráðingar heilt av nýggjum.

### Sambandsflokkurin meira sjálvstýrissinnaður

Sambandsflokkurin heldur, at slík mannagongd er ósømilig og eisini óneyðuga trupul. Flokkurin vil ikki loysa frá verandi ríkiseind, men setur heldur ikki foringar fyri at minka um blokkin. Skal blokkurin minka, skal tað verða við yvirtøkum, sum hava fulla gjaldsskyldu.

Hvønn av hesum báðum háttunum heldur Hanus Andreassen vera mest sjálvstýrishugaðan?

### Hvat er sjálvstýri?

Nú verður tosað og skrivað um hvussu vit skulu skilja heitið ”ríkisfelagsskapur”. Men vit kunnu eins væl spyrja, hvat veruligt sjálvstýri og sjálvræði merkir?

Hvat er tað veruliga sjálvstýrið, sum okkum tørvar í dag?

Hvat er eitt sjálvstýri, sum ikki eisini hevur eitt fíggjarligt og búskaparligt sjálvræði?

Um ikki formelt, so hava vit tó eitt stórt reelt sjálvræði og sjálvstýri. Men tað skal sjálvandi mennast og gerast enn størri, og tær bestu loysnirnar fyri at røkka hesum máli, finna vit í uppskotunum hjá Sambandsflokkinum og hjá Javnaðarflokkinum.

Hesir báðir andstøðuflokkar vísa á loysnir, sum eru munandi tryggari enn tær ætlanir, ið samgongan arbeiðir við.

### Óneyðugt at loysa

Fyri okkum er tað óneyðugt at loysa Føroyar úr verandi ríkiseind, fyri at greiða sjálvstýris-spurningin. Somuleiðis er tað beinleiðis vandamikið at loysa, áðrenn vit kunnu vísa á hvussu vælferðin verður tryggjað.

Vit hava ikki fyri neyðini at samráðast út frá ongum. Vit vilja heldur varðveita øll verandi rættindi, og síðani samráða okkum fram til eina nýggja sømuliga og gevandi avtalu landana millum. Eina avtalu, sum tekur burtur teir vansar og misskiljingar, sum hava verið, og somuleiðis skal avtalan vera so rúmlig, at hon ikki setur forðingar fyri framhaldandi dagføring, menning og ynskjum um broytingar, frá føroyskari síðu.

### Hava fólksins undirtøku

Nevndu ætlanir andstøðunnar eru eisini í fullum samsvari við tey 75%, sum seinasta veljarakanning vísti á, og um eg minnist løgmann rætt, so hevur hann sagt seg vilja arbeiða fyri teimum ynskjum, sum 75% av veljarunum hava, og tískil átti løgmaður og hansara flokkur at lurta meira eftir andstøðuni, heldur enn at krøkja seg so fastan til Tjóðveldisflokkin, sum vil hava alt ella einki.

Tað er mær ein gáta, hví Hanus Andreassen bert dugur at síggja ein teoretiskan møguleika fyri sínum sjónarmiðum í Nýskipanaruppskoti Sambandsfloksins. Gamaní, ikki alt, men ein stórur partur at tí, sum Hanus skrivar, er í góðum samsvari við okkara uppskot

Tað er væl ikki so gali, at ein sosialistur als ikki kann brúka nakað, sum kemur frá tí borgarligu síðuni?

**Tórshavn tann 29. februar 2000**

**Trygvi F. Guttesen**

Viðmerking:

# Hvar er skattalættin?

Ferð eftir ferð hava vit hoyrt um skattalætta frá sitandi loysingarsamgongu, og hetta tosið er serliga komi frá tí borgarliga vonginum í samgonguni — tað vil siga frá Fólkaflokkinum.

Men nú er aftur deyðatøgn um henda spurning. Tað sær út sum, at Fólkaflokkurin hevur fingið munnkurv frá Tjóðveldisflokkinum, og tí ikki má nevna skattalætta. Tjóðveldisflokkurin eigur jú fíggjarmálaráðharran, sum segði seg vilja sita ”tungt á kassanum”.

### Skattaborgarin merkir einki

Vit skattaborgarar hava hvørki sæð ella hoyrt um nakran skattalætta, men kortini kom okkurt fram í løgtinginum, um eina upphædd á 40 mió. kr. Hesin peningur skuldi nýtast til at endurnýggja fiskiskipaflotan við, men tingmenn kundu ikki semjast um, hvussu peningurin skuldi nýtast. Um eg minnist rætt, so skuldu hesar 40 mió. kortini nýtast sum eitt slag av skattalætta. Men enn er so eingin skattalætti at hóma.

Hvørja ferð vit hoyra frá okkara fíggjarmálaráðharra, so vísir hann á, at væl av peningi er í landskassanum (danski ríkisstuðulin íroknaður).

### Óbeinleiðis skattur

Skattur er so nógv. Vit mugu minnast til, at vit hava hópin av óbeinleiðis skatti, sum eingin tosar nakað um í dag. Fyri mær sær tað út til, at hesin óbeinleiðis skattur er komin fyri at vera, og eingin spyr um, hví so er.

Meginparturin av hesum nevnda skatti kom, tá ið landið fór á húsagang, av teirri vanstýring, sum hesir somu loysingarflokkar eisini stóðu fyri.

Tað skuldi verið ein funnin fressur hjá andstøðuni at komi við lógaruppskotum um avtøku av hesum óbeinleiðis skattum. Sum dømi kann nevnast, at tá ið eitt húsarhald fyllir sær oljutangan, so fer helvtin av kostnaðinum í landskassan.

### Krepputiltøk við ongari kreppu

Oljugjald, Mvg, tollur, punktgjøld og onnur krepputiltøk, fáa landskassan at flóta yvir, hóast vit ikki hava krepputíðir í dag. Um nakað varð gjørt, fyri at forkoma hesum kreppuuppskotum, sum nú hoyra eini farnari tíð til, so høvdu vit fingið ein munandi skattalætta kortini.

Undirritaði fer tí at heita á onkran í andstøðuni, um at fáa lagt eitt tilíkt uppskot fram á føroya løgting. Eg ivist ikki í, at um eitt slíkt uppskot kom, so vildu nakrir í loysingarsamgonguni eisini stuðlað uppskotinum.

Henda ónda ringrásin við óbeinleiðis skatti má steðgast fyrr ella seinni. Tess skjótari, tess betur. Men samstundis dugi eg eisini at síggja, at um hesin kreppuskattur sleppur at halda fram ótarnaður, og helst fer at vaksa við tíðini, so fer tað sanniliga at hjálpa til at fáa fleiri pengar í landskassan. Tá kunnu loysingarflokkarnir erpa sær av, at fleiri og fleiri pengar koma í kassan. Hetta verða góð kort í hondini, til at greiða bæði okkum føroyingum og dønum frá, at teir sanniliga kunnu minka um ríkisstuðulin.

Tí vil eg einaferð enn heita á tykkum í andstøðuni: Standi saman um tilík uppskot, sum kunnu føra til, at vit kortini fáa ein skattalætta sum munar.

**Bestu heilsur við sambandskvøðu**

**Andras Miðskarð**

# Trúboðaradóttur við tónleikaíblástri

Foreldur hennara vóru trúboðarar í Tanzania ein mansaldur - og framvegis er nakað av Afrika í likaminum hjá tí 33 ára gomlu sangaranum og tónleikaranum Lena Løbner Vegger, sum vitjar í Føroyum 3. til 5. mars í samband við eina tvørkirkjuliga lovsangsráðstevnu.

Endamálið við ráðstevnuni, sum verður hildin í Filadelfia í Havn, er at savna tær musikalsku kreftirnar úr teimum ymisku samkomunum í Føroyum í eitt stórt gospelkór, sum skal luttaka á stórfingnari stevnu í Ítróttarhøllini á Hálsi á hvítusunnu í ár.

Lena skal presentera eina røð av nýggjum sangum í føroyskum høpi, samstundis sum tað verður høvi til at endurfríska tað, sum hon kallar teir góðu gomlu vekingarsangirnar.

Lovsangsrástevnan er ein av fleiri tiltøkum, sum henda frammanundan krossferðina á hvítusunnu, sum verður fyriskipa av donska vekingarfelagsskapinum Evangelist í samstarv við 5 føroyskar samkomur.

Talan er um eina sokallaða – krossferð – 4 dagar við undirvísing av viðurkendum bíbliulærarum um dagin, og radikalum evangeliskum boðskapi við forbøn fyri sjúkum og útfríðan av illum andum um kvøldi.

### Trúgvin á Gud

Lena Løbner Vegger er spent upp á krossferðina, men fyrst og fremst gleðir hon seg til at savna kreftirnar í tí stóra kórinum, sum skal luttaka. Sum hjálparar í hesum arbeiði hevur hon allierað seg við operasangaranum Stig Rasmussen og lovsangaranum Eyðun Jacobsen, sum nýliga er fluttur til Føroya og býr í Havn.

Lena er kend í fleiri høpum, mest í Danmark, men eisini í Onglandi og á tí afrikanska meginlandinum, og hon hevur gjøgnum 10 ár sungið seg inn í hjørtuni á mongum dana. Trúgvin á Gud og kærleikin til menniskju er drívmegin aftanfyri tónleik hennara. Endamál hennara er at skriva tónleik, sum kann røra við lív menniskjans.

–Hóast tað er langt síðani eg fór heim frá trúboðaramarkini, havi eg framvegis nakað av Afrika í kroppinum. Eg hugsi ikki bara um rútmurnar, men eisini um tann inniligheit, sum eyðkennir Gudstrúgvina hjá afrikanarum, sigur Lena.

Hon hevur útgivið tríggjar fløgur, og tann fjórða er á veg. Hendan verður ein live-innspæling við nýggjum donskum lovsangum, sum verður upptikið á eini gudstænastu í Keypmannahavn tann 1. apríl.

### Byrjaði sum 11 ára gomul

Tónleika karriera hennara byrjaði í smáum í hvítusunnusamkomuni Betania í einum lítlum landsbýi. Báðir brøður hennara spældu guitar í sunnudagsskúlanum, og tá Lena var 11 ár, skrivaði hon sín fyrsta sang.

– Eg framførdi hann fyri beiggja mínum, sum vísti mær, hvussu eg kundi spæla sama sang, men við øðrum akkordum. Hann inspireraði meg, tað hevði við sær, at eg valdi at sita inni og spæla guitar heldur enn at fara út at spæla, minnist Lena.

Síðani kom glið á tónleikin. Lena varð leiðari fyri barnakórinum í samkomuni, tá hon var 12 ár og gjørdist seinni leiðari fyri ungdómskórinum í samkomuni, sum tá hevði 40 luttakarar. Tá hon var 14 ár framførdi hon fyrstu ferð solosang; hetta var á einum útifundi í Jútlandi. Síðani varð hon biðin um at luttaka við trimum sangum á eini bandútgávu, sum løgdu lunnar undir hennara egnu útgávur *Som en blomst (1988), At være (1994)* og *Det der betyder noget (1999).*

### Nøkur ganga til psykolog

Íblásturin til bæði gomul og nýggj løg heintar hon í gerandisdegnum og gjøgnum bøn. Nógvir av sangum hennara eru vorðnir til undir trongum korum, tað vil siga í truplum umstøðum, har hon hevur fingið Guds hjálp.

–Nøkur ganga til psykolog. Onnur yrkja. Eg skrivi sangir, greiðir Lena frá. Hon er mamma at tveimum børnum og dagrøktarmamma.

Tað er sum um alt gongur upp í eina hægri eind. Við Harrans hjálp hevur tað eydnast Lenu at samantvinna familjulív, arbeiði og tónleik.

Lena Løbner Vegger syngur gospel og vísusangir við afrikarútmum. Nú í mars mánaði kemur hon til Føroya fyri at savna eitt stórt kór.